# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## MERKISDAGAR

**70 ára føðingardagur**
Sunnudagin 1. nov. verður Elsa Egilsnes, Vestmanna, 70 ár. Dagurin verður hildin á Fjørukrønni frá kl. 16. Øll eru vælkomin.

**80 ára føðingardagur**
Mánadagin 2. nov. verður Maria Magnussen við Eirikstoftir í Miðvági 80 ár. Opið hús er heima hjá Mariu og Jóhan mánadagin frá kl. 14 og úteftir, og eru øll hjartaliga vælkomin at heilsa uppá Mariu.

**80 ára føðingardagur**
Hósdagin 5. nov. verður Sámal Christiansen, vanliga nevndur Sámal hjá Barbu, Klaksvík, 80 ár. Dagurin verður hildin í Skálanum leygardagin 7. nov. Opið hús er frá kl. 18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**90 ára føðingardagur**
Hósdagin 29. okt. fyllir Jensia Svabo Thomasen, Sandavágur, 90 ár. Dagurin verður hildin heima, Giljavegur 62, frá kl. 18.

**Silvurbrúdleyp**
Mánadagin 2. nov. hava Óluva og Jónfríður Nielsen, Saltangará, verið gift í 25 ár. Tey eru burturstødd.

**Silvurbrúdleyp**
30. nov. hava hjúnini Alberta og Eirikur Magnussen, Tórshavn, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin leygardagin 28. nov. í HB-Húsinum kl. 19. Tey ið ynskja at gleða okkum við at koma, verða biðin um at siga fra á tlf. 216324 (Alberta) ella 214456 (Eirikur) innan 14. nov.

**Gullbrúdleyp**
Sunnudagin 1. nov. hava Kristina og Hans Andrias Jacobsen (Stina og Dia av Syðradali), gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin 7. nov. í Bøgøtu 3, Klaksvík. Vælkomst verður frá kl. 19. Tey, ið ynskja at heilsa uppá Kristinu og Hans Andrias, kunnu siga frá á tel. 456737 ella 458625.

**Gullbrúdleyp**
Sunnudagin 8. nov. kunnu hjúnini Herborg og Hildibjart Johansen, Tórshavn, halda gullbrúdleyp. Tey ið ynskja at heilsa uppá gullbrúðarparið, eru vælkomin til eina hugnaliga løtu í Starvsmannafelagshúsinum J.H. Schrøtersgøta 9 frá kl. 12 til 17.

**Gullbrúdleyp**
28. nov. hava hjúnini Tóra og Ólavur Nolsøe Olsen, Fuglafjørður, gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í bygdahúsinum í Leirvík leygardagin 5. des. kl. 18. Tey ið vilja halda dagin saman við okkum, kunnu siga frá á tlf. 444159 - 737751 ella toraolavur@gmail.com áðrenn 20. nov.

### Prógv



Fríggjadagin 23. oktober tók Durita Kristina Hoydal prógv sum Cand. Soc. in creative business processes (CBP) við Copenhagen Business School og harumframt Master of Science in management and economy of arts, culture, media and entertainment (ACME) við Universitá Bocconi í Milano.

†

### Andlát og jarðarferðir

**Johanna Jacobsen, fødd Mortensen, við Sílanna á Tvøroyri**, búsitandi í Ordrup, andaðist 26. oktober, 77 ára gomul. Jarðarferðin verður fríggjadagin 30. okt. kl. 11 úr Skovshoved kirkju.

Kistan við **Eskild Højgaard** fer av Røktarheiminum í Runavík hóskvøldið klokkan 19:30. Jarðarferðin verður úr Fríðrikskirkjuni fríggjadagin klokkan 13. Tey, ið vilja minnast Eskild, kunnu lata Eysturoyar Røktar- og Ellisheimi eina peningagávu. Konta í peningastovnum

**Bergur Petersen, Kambsdalur**, andaðist 27. oktober, 77 ára gamal.

**Fía Toftegaard í Fuglafirði** andaðist á Landssjúkrahúsinum, mánadagin 89 ára gomul.

**Ása Udbø úr Havn, búsitandi í Hirtshals**, andaðist á Hospice Vendsyssel í Frederikshavn, sunnudagin 25 oktober, 60 ára gomul. Jarðarferðin verður lýst seinni.

### Dagurin
29. oktober. Narcissus, doyði í árinum 222. Hann hevur helst verið av grikskari ætt og gjørdist 30. biskupurin í Jerusalem. Hann segðist at vera 116 ár, tá ið hann doyði.
*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*

